# Eldraøkið ein ov stórur biti

**Heini O. Heinesen varð afturvaldur í Kunoyar bygdarráð. Hann hevur sitið har seinastu 28 árini, og hann heldur ikki nógv um ætlaninar hjá landinum at leggja eldraøkið út til kommunurnar at umsita. Hann heldur, at tað er ein hóttan móti lægru inntøkunum**

KOMMUNUVAL 04
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



**Kunoy:** Borgarstjórin í Kunoyar kommunu seinastu 28 árini, Heini O. Heinesen, heldur lítið um, at ov nógv øki verða flutt yvir til kommunurnar at umsita.

– Tað er alt í lagi at leggja barnaansingina til kommunurnar, men eldraøkið, haldi eg, er ein ov stórur biti, so har eri eg samdur við landsstýrismanninum, sigur Heini O. Heinesen.

*– Man er sjálvandi góður við tað, sum man hevur verið við til at barst fyri nógvu seinastu árini, men í aðra mátar skal eg viðganga, at áhugin fyri landspolitikki var blivin nakað størri, sigur Heini O. Heinesen*

Hann heldur, at hetta er tað sama sum at leggja eftir miðalinntøkunum, tí tær verða harðast raktar av kommunuskattinum.

Kommunuskattaprosentið í Kunoyar kommunu er 15 % og samstundis tað lægsta í landinum. Kommunan er væl fyri fíggjarliga og hevur onga skuld. Heini greiðir frá, at íløgurnar í kommununi í ár liggja um tvær milliónir krónur.

– Sitandi bygdarráð fer helst at hava einar tveir fundir afturat, væntar hann.

### Skatturin fer at hækka

Heini heldur, at eitt tað fyrsta, sum hendir, um kommunurnar fara at fáa eldraøkið, verður, at skatturin hækkar, og harvið verða miðalinntøkurnar hart raktar.

– Tá nyttar lítið at tosa um at lækka landsskattin, sigur fyrrverandi løgtingslimurin og sitandi borgarstjóri í Kunoy.

Heini sigur, at hann sjálvandi vil hava greiðar linjur millum kommunur og land, men hann er sannførdur um, at tað verður ov nógv at leggja eldraøkið út til kommunurnar. Og vísir samstundis á, at tá er ikki nógv eftir hjá løgtinginum.

### 28. árið

Heini O. Heinesen hevur verið borgarstjóri í Kunoyar kommunu í 28 ár tann 1. januar komandi ár.

Fyrr í ár umhugsaði hann ikki at stilla uppaftur, tí hansara áhugi fyri landspolitikki var nakað størri. Men hann varð ikki afturvaldur til seinasta løgtingsval, og tá hann so varð biðin um at stilla upp aftur til hetta kommunuvalið, játtaði hann.

– Man er sjálvandi góður við tað, sum man hevur verið við til at barst fyri nógvu seinastu árini, men í aðra mátar skal eg viðganga, at áhugin fyri landspolitikki var blivin nakað størri, sigur Heini, sum ynskir at takka øllum teimum, ið valdu hann.

Tvær bygdir eru á Kunoynni, Haraldsund og Kunoy. Til hetta valið fekk Haraldsund trý umboð í bygdarráðið og Kunoy tvey. Sostatt verður tað úr Haraldsundi í ár, at fundarboðini um at skipa bygdarráðið koma.

# Eyðgunn fekk eitt herðaklapp

**– Eg veit slettis ikki, hvat eg skal siga. Hetta hevði eg als ikki væntað, segði Eyðgunn Samuelsen, sum við 201 atkvøðum fekk eitt ordans herðaklapp frá borgarunum í Klaksvíkar kommunu**

BÝRÁÐSVAL 04
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Eyðgunn Samuelsen úr Javnaðarflokkinum fekk eitt sera gott val. Hon fekk 201 persónligar atkvøður og var nummar tvey á toppskoraralistanum í Klaksvíkar kommunu*

**Klaksvík:**
Vanligt er, at valevnini koma í valhølini at fylgja við uppteljingini, og spenningurin plagar at vera rættiliga stórur. Tað var hann eisini í ár, men á borðinum hjá Javnaðarlistanum var ikki so øgiligur spenningur um, hvør mundi fara at fáa flestu atkvøðurnar. Bunkin hjá Eyðgunn Samuelsen var nógv størstur. Við knapt 100 atkvøðum fleiri enn Thorleif Sigurðsson, sum varð næstvaldur á listanum, bleiv Eyðgunn nummar tvey á toppskoraralistanum fyri valinum - aftan fyri Steinbjørn.

– Eg eri fullkomuliga ovfarin av hesum, hetta hevði eg als ikki varhugan av, segði ein fegin Eyðgunn Samuelsen beint aftaná, at endaliga úrslitið frá valinum í Klaksvík var greitt.

Eyðgunn segði, at hon hevði kortini fingið ta fatanina, at hon fór at klára tað, teir seinastu dagarnar áðrenn valið, men hon legði dent á, at so nógvum atkvøðum hevði hon ikki roknað við.

Persónliga var Eyðgunn avbera vælnøgd, og hon fekk eisini nógvar heilsanir við á vegnum, tá hon fór úr valhølunum og heim til eitt fult hús av gestum.

Onkur helt fyri, at tað var serstakliga flott av henni, serliga tá hugsað verður um, at Eyðgunn er tilflytari. Hesum flenti afturvaldi býráðslimurin úr Vágunum bert at.

# Væl blandað í singer/songwriter

**Mótstøðumaðurin hjá Róki Jacobsen í finaluni skal finnast millum fýra ógvuliga ymiskar luttakarar leygarkvøldið í Singer/songwriter 2004**

TÌÐINDASKRIV
*Hotel Hafnia*



Seinasta vikuskiftið byrjaði singer/songwriter 2004 við einum braki í Hafnia Lounge. Hølini vóru stúgvandi full av fólki, og áhoyrarnir tóku frálíka væl ímóti góðu góðskuni av lítla pallinum.

Ì kappingini er tað ikki pláss fyri teimum heilt stóru armsveiggjunum. Tað er tónleikurin, sum er í hásæti.

Hetta er aðru fer, at Hotel Hafnia fyriskipar kappingina. Í ár er tað í samstarvi við Heineken. Stuðul er Atlantic Airways.

Útvarp Føroya tekur upp, og brot frá kappingini verða send í útvarpinum seinni í vikuni.

Leygarkvøldið eru fýra luttakarar í kappingini at røkka finaluni. Kappingin leygarkvøldið byrjar kl. 21.30.

### Yngri

Sum nevnt umboða luttakararnir leygarkvøldið eina rættiliga stóra breidd. Teir báðir yngru luttakararnir leygkarkvøldið eru 18 ára gamli Jóannes Lamhauge úr Havn og 24 ára gamli fuglfirðingurin Jógvan Arnfinn Jacbosen.

Hetta er aðru ferð, at Jógvan A. Jacobsen luttekur í Singer/songwriter. Umframt at vera eitt ár eldri enn í fjør, er Jógvan eisini vorðin pápi, og hetta gjørdi tað neyðugt at flyta til Havnar. Tónleikastílurin er eisini vorðin meira mainstream, metir Jógvan, sum roynir at nýta tær fríløturnar hann kann til at spæla tónleik.

Leygarkvøldið fer hann at spæla ein fosturlandssang, ein politiskan sang og eitt coverlag.

Jóannes Lamhauge kenna fólk best frá sannleikinum um Jósef og tað ótrúliga litfagra dreymakotið, har hann hevði høvuðsleiklutin.

– Eg eri bangin fyri, at fólk fara at síggja meg sum Josef. Eg vil gjarna vísa fleiri síður av sær sjálvum.

Hann fer í Hafnia Lounge leygarkvøldið at borðreiða við millum annað tveimum kærleikssangum, sum eru djúpari enn bara tað.

Jóannes hevur fleirfaldaðar listagávur, og hann hevur ikki ta nógvu tíðina til tónleik, tá hann eisini fæst við skúla, list og ítrótt.

Jóannes er yngsti luttakarin í kappingini, men hann hevur góðar vónir og gleðir seg at sleppa at royna seg við sínum egnu løgum á pallinum.

### Eldri

Teir báðir eitt sindur eldri tónleikararnir á pallinum leygarkvøldið eru Kári Páll Nolsøe og Ragnar í Vík. Meðan tey flestu mestur kennast við navnið hjá Ragnari í Vík, so er Kári Páll Nolsøe ikki heilt óroyndur innan tónleik, hóast hann kanska ikki hevur verið eins nógv frammi í miðlunum.

Hann hevur spælt tónleik í tólv ár. Millum annað hevur hann verið at hoyrt á Prix Føroyum við bólkinum Pínadoyð. Kári Páll Nolsøe er úr Havn, og hann sigur seg eiga eitt hav av sangum liggjandi.

Buruturúr hesari rúgvuni sleppa áhoyrarnir leygarkvøldið at hoyra ein sang til jørðina, ein sang til eina damu, og í tí eina sanginum syngur hann um eina damu, sum ikki kemur.

Ragnar í Vík er í teirri øðrvísi støðu í mun til hinar luttakararnar, at hann hevur givið tvær fløgur út.

Hann hevur eisini verið á ferð í sjálvum høvuðsstaðnum fyri country tónleik, Nashville, fyri at sleppa longur út í heim við sínum spæli. Seinasta stigið á hesari leiðini er, at hann hevur fingið sær ein manager í Norra, sum hevur góð sambond til millum annað Nashville.

Ragnar sigur, at tað bert er til stuttleika, at hann hevur meldað seg til kappingina. Sangirnir hjá honum leygarkvøldið siga hvør sína søgu um hansara fyrra og seinna lív og tíðarskeiðið millum lívini.



# Eg eri øgiliga spent

**Tá ið 22 ára gamla Bjarta Berg varð biðin um at stilla upp til bygdaráðsvalið í Hvalba, tók hon tað ikki í álvara í fyrstuni. Men tað nyttar heldur onki, at øll bera seg undan, sigur hon**

KOMMUNUVAL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Bjarta Berg í Nesi í Hvalba tók tey flestu á bóli á bygdaráðsvalinum týsdagin. Eg kann onki lova, uttan at gera mítt besta og arbeiða eftir bestu sannføring, sigur hon*

**Hvalba:** – Hetta hevði eg avgjørt ikki væntað.

Bjarta Berg í Nesi í Hvalba var heilt óvfarin, tá ið úrslitið av bygdaráðsvalinum í Hvalba varð talt upp.

Hon var eitt av val-evnunum á lista A og tá ið avtornaði hevði hon fingið 36 atkvøður.

Og tað var nóg mikið til ein sess í nývalda bygdaráðnum.

Hetta var eitt úrslit, sum kom fullkomiliga óvart á hana, serliga tí hon hevur onki gjørt fyri at føra valstríð og hon hevur avgjørt ikki fylt bløðini við valgreinum.

### Tók tað ikki í álvara

Leikluturin sum bygdaráðslimur er ikki ein leiklutur, sum hon hevði fyrireikað seg til.

– Tá ið eg varð spurd um at stilla upp, tók eg tað ikki í álvara í fyrstuni. Men eftir at hava hugsað meg um, gjørdi eg kortini av at taka av.

– Tað er trupult at fáa fólk at stilla upp, men tað verður mangan grenja um, at onki verður gjørt. Eg haldi, at tað er skeivt, at øll bera seg undan fyri síðani at fýlast á, og tí gjørdi eg av at játta at stilla upp.

Hon dylir ikki fyri, at hon er sera fegin um úrslitið og nú hon er vald, er hon eisini til reiðar at fara til verka.

Men hon ger samstundis greitt, at hon kann ikki lova nakað sum helst – uttan at gera sítt besta.

– Tá ið fólk spurdu meg um eina góða grund fyri at seta krossin við meg, svaraði eg, at eg kundi ikki lova teimum nakað, uttan at arbeiða eftir bestu sannføring og at gera mítt besta. Tað ber jú ikki til at gera nakað einsamøll, tí tað krevur ein meiriluti í bygdaráðnumfyri at fáa eitt mál ígjøgnum.

– Tað einasta, at kann lova, er, at eg fari at viðgera tey mál eftir besta førimuni, sum verða løgd fyri bygdaráðið.

Men hon heldur kortini, at tað eru nógv viðurskifti í Hvalba, sum treingja til eina bøtandi hond. Millum annað heldur hon, at kommunan eigur at leggja stóran dent á at røkja bygdina væl, so at hon verður eitt prýði.

Annars heldur hon, at kommunan er reiðiliga væl fyri, bæði hvat eldraøkinum og dagrøktarøkinum viðvíkur.

Kortini hevur hon ymsar hugsanir um nøkur viðurskifti í bygdini, sum hon sigur, at enn er alt so leyst, at hon vil ikki siga meiri um tað enn.

Men hon heldur eisini, at tá ið nakað verður gjørt, sum kostar kommununi pening, er tað sera umráðandi, at tað er varandi og ikki bara eitt upplop, sum dettur niðurfyri aftur beinanvegin, tí so hevur kommnan brúkt pening til onga nyttu.

– Tað er ikki óvanligt, at ymisk tiltøk fáa stóra undirtøku í fyrstuni, men so fjarðar áhugin burtur aftur, so at alt dettur niðurfyri aftur. Tað heldur hon, at kommunan eigur at tryggja seg so frægt ímóti sum hon kann, so at peningurin ikki verður brúktur nyttuleyst.

Av tí at hon er spildurnýggj í politikki, hevur hon ikki so nógvan kunnleika til kommunupolitikk og hon sigur, at tann fyrsta tíðin skal eisini brúkast til at fáa royndir.

– Men hetta er ein ógvuliga spennandi avbjóðing, sum eg gleði meg nógv til at fara í holt við. Sum nýggj í kommunupolitikki, veit eg ikki, hvørjá avirkan eg fái, men hetta er ikki ein uppgáva, sum eg stúri fyri, sigur hon.

– Og eg eri øgiliga spent at sleppa til verka, leggur hon afturat.

### Skúlin vakti áhugan

Bjarta Berg tók studentsprógv í fjør. Síðani hevur hon havt fyrifallandi arbeiði í Havn, men nú hevur hon fingið læruplás í Føroya Banka á Tvøroyri.

Og tað var á studentaskúlanum í Vági at áhugin fyri politikki kyknaði.

– Vit høvdu nógv um politikk á skúlanum, serliga í sambandi við løgtingsvalið, sum vit gjørdu nógv burturúr, bæði í søgu og í samfelagsfrøði. Samstundis høvdu eisini lærarar, sum vóru sera áhugaðir í politikki og tað smittaði alt samalt.

Men um hetta so er startskotið til eina politiska karrieru, veit hon ikki.

Ikki tí, áhugin fyri politikki er avgjørt til staðar.

Hinvegin heldur hon ikki, at ein skal fara upp í politikk, sum ikki hevur stundir og vilja til at røkja tað starvið væl og virðiliga og tað er kanska ikki so lætt at vit,a hvørjar raðfestingarnar verða seinni í lívinum.

– Ein skal ikki vera uppi í politikki, bara fyri at vera uppi í politikki, heldur Bjarta Berg.

# Kristin Michelsen heldur fram á Tvøroyri

**Tað er alt sum bendur á, at Kristin Michelsen heldur fram sum borgarstjóri á Tvøroyri**

KOMMUNUVAL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Týsdagin settu heili 225 tvørafólk krossin við borgarstjóran, Kristin Michelsen, so hann verður ómetaliga ringur at dribla rundanum, tá ið borgarsatjórin skal veljast*

Tað kann næstan sigast við fullari vissu, at Kristin Michelsen heldur fram sum borgarstjóri á Tvøroyri.

Hann hevur verið borgarstjóri hesi bæði seinastu árini og hevði eitt satt kanónval týsdagin, har hann fekk næstan tríggjar ferðir so nógvar atkvøður, enn næsti maður á javnaðarlistanum. Hann fekk heilar 225 atkvøður og næsti maður, Pauli Einarsson, fekk 87.

Samstundis dróg hann javnaðarflokkin upp á fýra býráðslimir í næsta valskeiði, eftir at teir hava havt tríggjar býráðslimir í hesum valskeiðnum.

Við fýra býráðslimum í næsta valskeiði, hava javnaðarmenn sostatt meiriluta einsamallir í býráðnum.

Tí taka teir sær eisini tað tíð, sum tað skal taka at skipa nýggja samgongu, tí teir vita, at ongin kann stjala borgarstjóran frá teimum ímeðan teir liggja í fasta svøvni, eins og tað hendir í Havn, har borgarstjórin skiftir hvørja nátt.

Og tað er ikki óvanligt, at tann, sum fær flestar atkvøður, verður borgarstjóri, hóast frávik eru gjørd, meiri enn so.

Men hesuferð tykist tað greitt, at Kristin fer at halda fram, siga keldur, sum standa býráðnum á Tvøroyri nær.

Annars hevur tað verið víst til, at Kristin Michelsen er kendur tjóðveldismaður, sum akkurát er komin upp í javnaðarflokkin og tað hóvar ikki øllum javnaðarfólki so væl at velja hann lúkst til borgarstjóra, nakrar vikur eftir at hann er komin upp í flokkin.

Men tað skilst, at hetta fær onga ávirkan, tí veljarin hevur talað, er hugburðurin á Tvøroyri.

Tað ljóðar eisini, at ætlanin er at bjóða sambandsflokkinum og samgongulistanum upp í eitt samstarv, men tað veldst um, hvørjar treytir, partarnir kunnu tosa seg til rættis um.

## Vágbingar fáa kanska kvinnuligan borgarstjóra

**Í skrivandi løtu er alt sum bendir á, at tíðarskeiðið við Jógvani Krosslá á ovastu rók í Vági, er liðugt. Hinvegin kunnu vágbingar fáa sín fyrsta, kvinnuliga borgarstjóra**

KOMMUNUVAL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tað hevur verið mett nokk so sannlíkt, at Kirstin Strøm Bech verður fyrsti, kvinnuligi borgmeistari í Vági*

Alt bendir á, at Jógvan Krosslá er liðugur sum borgarstjóri í Vági eftir 12 ár í starvinum. Tjóðveldisflokkurin misti ein lim í býráðnum til sambandsflokkin og tað kann koma at kosta flokkinum dýrt.

Uttanflokkalistin, sambandslistin og javnaðarlistin hava sostatt seks býráðslimir av teimum níggju í Vági og sostatt er tað munandi lættari at skipa meiriluta uttanum tjóðveldisflokkin, enn tað var í hesum valskeiðnum, nú tjóðveldisflokkurin hevur fýra býráðslimir.

Og tað er júst tað, sum hendir. Uttanflokkalistin, sambandslistin og javnaðarlistin samtyktu mikukvøldið at skipa samgongu.

Men tey býttu ikki nevndarsessir ella settu navn á formansskapin í tí fundinum.

Men fyrst valdir av limunum í nýggju samgonguni, er Kirstin Strøm Bech úr javnaðarflokkinum, sum fekk 74 atkvøður.

Og tað hevur verið mett at vera nokk so sannlíkt, at hon fór at taka av møguleikanum.

Sostatt hava útlit verið til, at vágbingar fóru at fáa sín fyrsta, kvinnuliga borgarstjóra.